## Altingið skal útvarpast

Tíggju tingmenn úr øllum flokkum í íslendska Altinginum hava lagt fram uppskot um at skipa so fyri, at allir tingfundir verða sendir beinleiðis á serligari útvarpsrás, sum skal hoyrast um alt landið. Eftir uppskotinum skulu sendingarnar byrja í heyst. Tey, sum hava lagt uppskotið fram, siga í viðmerkingunum, at í hesum tøknitíðum er tað sjálvsagt, at tingfundir verða útvarpaðir, so fólk fáa høvi at fylgja við politiska arbeiðinum.



*Íslendingar eiga at hoyra, hvat hendir í Altinginum*

*(Mynd: Morgunblaðið)*

## Kjak um formansval

Í sambandi við formansvalið í grønlendska Siumutflokkinum er komið fram, at flokkurin fekk óvanliga nógvar limir sama dag, sum formansvalið var. Millum annað varð limatalið tvífaldað í trimum teimum størstu býunum, Nuuk, Sisimiut og Ilulissat, og í bygdini Qaarsut. Tað hevur vakt ans. Summi vilja vera við, at fólk kunnu ikki tekna seg sum lim og so atkvøða um formannin, men floksleiðslan vísir atfinningunum aftur.

# ltjóða stevnu fyri tónleikaídnað




*Ein belgisk dómsnevnd hevur valt Boys in a Band (mynd), Gestir, ORCA og Budam út til at umboða føroyskan tónleik á stórum mentanarátaki, sum verður í Brússel í mai*

Eini 20 nøvn – serliga innan popp og rock - eru við í hesum elektroniska kataloginum, sum er framleitt nú í sambandi við MIDEM-ráðstevnuna.

- Ætlanin er at byggja heimasíðuna út, soleiðis at vit fáa ein føroyskan tónleikaportal, ið umboðar øll sløg av tónleiki.

SamVit hevur ítøkiligar ætlanir um at menna ein kreativan portal fyri allar kreativar vinnur, og tónleikaportalurin er fyrsta ítøkiliga stigið í ætlanini.

Til samanburðar verður víst á, at ymisk fiskasløg eru ymisk á skræðuni, men felags fyri tey øll er, at góðskan er í hásæti, og at stovnurin er føroyskur, sigur SamVit.

### Fýra bólkar

Ein belgisk dómsnevnd hevur valt Boys in a Band, Gestir, ORCA og Budam út til at umboða føroyskan tónleik á stórum mentanarátaki, sum verður í Brússel í mai.

- Dómsnevndin, ið umboðar tónleikafjølmiðlar, konsert- og festivalfyriskiparar, hevur í eina tíð mett um føroyskar tónleikabólkar í eini úrveljingartilgongd fyri at finna fram til teir føroysku bólkarnar, sum tey meta kunnu gera seg galdandi á altjóða palli í Belgia.

SamVit sigur, at dómsnevndin hittist í vikuni á Sendistovu Føroya í Brússel til síðsta umfar.

- Her varð atkvøtt um, hvørjir fýra bólkar skulu spæla á føroyska mentanarátakinum í Brússel 3. mai í ár, sum Sendistova Føroya í Brússel saman við okkum, Norðurlandahúsinum/AME og Mentamálaráðnum skipa fyri.

### Belgiarar hugtiknir

Sum skilst, var belgiska dómsnevndin sera hugtikin av føroysku tónleikabólkunum, og tað sást á atkvøðulutfallinum, at allir bólkarnir høvdu vakt ans.

- Tá ið avtornaði, vóru tað tó fýra bólkar – Boys in a Band, Gestir, ORCA og Budam, sum lógu frammanfyri hinar, og tað verða sostatt hesir fýra, ið skulu spæla á mentanarátakinum.

SamVit sigur, at ætlanin við hesum átaki er at marknaðarføra føroyska listarliga framleiðslu í Belgia, og umframt føroyska tónleikin, verður eisini føroysk myndlist partur av átakinum.

- Skipað verður eisini fyri móttøku við føroyskum mati, har høvið verður hjá belgiska og føroyska tónleika- og listaumhvørvinum at hitta hvønn annan, sigur SamVit.

Tey, sum ynska sær gjølligari kunning um átakið í Brússel, kunnu venda sær til SamVit á tlf. 306900/ 288901 ella Sendistovu Føroya í Brússel, tlf. +32 478602472.